LM-039/2025

LØGTINGIÐ

Fíggjarnevndin

Til løgtingsforkvinnuna

18. februar 2026
hm/ód

Leingjan av freist til framløgu av áliti í løgtingsmáli nr. 39/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Avtøka av stigvísu minkingini av uttanlandsfrádráttinum)

Uppskotið var til 1. viðgerð 11. november 2025, og eftir hetta varð tað beint Fíggjarnevndini. Vegna nevndarviðgerðina av m.a. uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2026 fekk nevndin longda freist at skriva álit til 18. februar 2026. Vegna nevndarviðgerðina av m.a. uppskotinum um Suðuroyartunnil hevur nevndin tó ikki havt hoyringar í málinum enn; fyrstu hoyringarnar í málinum verða 19. februar 2026.

Tí fer nevndarforkvinnan at heita á løgtingsforkvinnuna um at leingja freistina sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini viðvíkjandi omanfyrinevnda løgtingsmáli til mikudagin 11. mars 2026.

Vegna nevndarforkvinnuna

Hallur Markná
nevndarskrivari

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO